# VIT HAVA EINA FELAGS UPPGÁVU



Okkara børn skulu læra eina rúgvu, meðan tey vaksa upp. Tey skulu læra um okkara mentanarligu virðir, eitt nú "ábyrgd", "fólkaskikk", "felagsskap" og "reiðiligheit".

Samstundis skulu tey tilogna sær fakligar førleikar, so tey kunnu føra samfelagið víðari eftir okkum.

Nakað læra tey heima og annað læra tey í skúlanum, men tað mesta læra børnini í báðum støðum samanlagt. Tí tingini hanga saman og tí eiga vit at loysa uppgávuna í felag.

Um so er, at trupulleikar stinga seg upp, eiga vit vaksnu at lurta og leggja enn meira orku í samstarvið.

**Frítt eftir Rasmus Alenkær**